


## Íløguspælið á ilogur.fo - 1. vika

# Djørvu spælararnir staðið seg best

**Bestu spælararnir í íløguspælinum hava rentað milliónina við upp í 84,07 prosent eftir einari viku. Hetta er jú eitt spæl, har tað ræður um at taka kjansir, um ein vil fylgja við toppinum.**

ÍLØGUSPÆLIÐ
*Hilmar Simonsen*

Júst ein vika er liðin, síðan íløguspælið varð skotið í gongd, og hesa vikuna hava vit sæð ein rættiligan tilmeldingarstorm, men eisini stóra renting til teir fremstu spælararnar.
Nummar eitt, tvey og trý hava rentað milliónina við ávikavist 84,07, 76,21, og 57,69 prosentum, og tað er sera nógv samanborið við marknaðin sum heild. Og bróðurparturin av teimum tilmeldaðu liggur ikki á tí latu síðuni.
- Taka vit støði í fríggjadegnum, so síggja vit, at 3.117 vóru tilmeldað. Av hesum høvdu 2.085 gjørt íløgur, sigur Jan Otto S. Holm, deildarstjóri í Kaupthing Bank, sum fegnast um stóra áhugan fyri íløguspælinum.
Hóast spælið kom seinni í gongd enn ætlað, orsakað av byrjunartrupulleikum fyri gott tveimum vikum síðani, so hevur hetta ikki minkað um áhugan fyri spælinum. Áðrenn spælið varð skotið í gongd vóru umleið 1800 tilmeldað, men hetta talið er sum sagt økt munandi.



### Tak kjansir

Ymiskt er, hvussu ymsu spælararnir hava staðið seg higartil, men Jan Otto S. Holm ivast ikki í, at teir sum hava staðið seg best eru teir, sum hava torað at satsa.
- Tað er onki at dylja yvir, at tú vinnur ikki eitt tílíkt spæl, um tú ikki tekur kjansir. Hetta er ikki sum at gera íløgur í tí veruliga lívinum, har tað ræður um at spjaða váðan. Her hevur tú 3 mánaðir at fáa peningin at vaksa, í veruliga lívinum hevur tú kanska þeiri ár, greiðir Jan Otto Holm frá.
Vit eru nú komin inn í næstu spæliviku, hvørji ráð hevur tú til spælararnar?
- Tað ræður um at halda høvdið kalt. Hevur ein handil givið tær vinning, so er kanska rætt at selja og heysta vinningin. Hevur ein handil givið tap, so er kanska eisini rætt at selja, tí tað er ikki vist, at gongdin fer at venda í bræði. Annars vil eg mæla til at fylgja við og kanna, hvat ávirkar partabrævakursir, sigur hann.





Í nógvum førum er talan bert um ábendingar. Til dømis verða oljupartabrøv vanliga ávirkað av oljuprísinum, men hyggja vit eftir Atlantic Petroleum, so er hetta ikki galdandi.
Jan Otto S. Holm vísir á, at onki er givið upp á forhond, tá talan er um íløgur, og tað er ikki altíð lætt at spáa um gongdina. Og hetta ger íløguspælið til nakað serligt.
- Í veruliga lívinum kann ein tola, at alt ikki gongur eftir vild í byrjanini, men í íløguspælinum er ikki nógv tíð til at bíða.

**Gongdin hjá topp 3** (vika 39)




**Topp 10** (1. okt. 2007 kl. 11.07)

| Leikari | Reiður peningur | Partabrævaogn | Ogn | Avkast |
|---|---|---|---|---|
| Safe Invest | 1.840.661,24 kr. | 0,00 kr. | 1.840.661,24 kr. | +84,07 % |
| villi80 | 1.762.086,29 kr. | 0,00 kr. | 1.762.086,29 kr. | +76,21 % |
| hanna21 | 1,48 kr. | 1.576.943,78 kr. | 1.576.945,27 kr. | +57,69 % |
| jubiijan | 1.564.351,76 kr. | 0,00 kr. | 1.564.351,76 kr. | +56,44 % |
| foelv | 2,23 kr. | 1.421.559,53 kr. | 1.421.561,76 kr. | +42,16 % |
| navijoe | 1.405.384,62 kr. | 0,00 kr. | 1.405.384,62 kr. | +40,54 % |
| johanna | 822.058,97 kr. | 364.256,81 kr. | 1.186.315,78 kr. | +18,63 % |
| sabjorn | 11,75 kr. | 1.170.393,00 kr. | 1.170.404,75 kr. | +17,04 % |
| NightOwl | 773.955,28 kr. | 384.719,32 kr. | 1.158.674,60 kr. | +15,87 % |
| dul | 1.018.986,83 kr. | 125.896,26 kr. | 1.144.883,10 kr. | +14,49 % |

www.kaupthing.fo Sosialurin KAUPTHING BANK